

*– Tá vit fóru at syngja á donskum, vistu vit, at tað fóru at koma nakrar reaktiónir, tí tað var kanska eitt sindur judas-agtigt at gera tað, sigur Hans Edward Andreasen, sangari í The Dreams*

**MYND:** PRESSUMYND

# Løgið at skifta sangmál í heilum

– HVØRJA FERÐ, EG HAVI VANT MEG VIÐ AT SYNGJA Á EINUM MÁLI, SO SKIFTA VIT. MEN NÚ DUGI EG IKKI FLEIRI MÁL, SIGUR HANS **EDWARD ANDREASEN**, SUM NÚ SKAL SYNGJA Á ENSKUM Í ROCKBÓLKINUM **THE DREAMS**



**TÓNLEIKUR**
**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Fyrst sang hann á enskum, so flutti hann yvir í føroyskt mál, síðani skuldi danskt føra hann fram, og nú er hann aftur í klassiska rockmálinum, enskum.

Hans Edward Andreasen hevur roynt eitt sindur av hvørjum í rockbólkinum The Dreams, men tað má verða heldur sjáldsamt, at ein bólkur skiftir málið í sínum sangum reguliga út.

– Tað er eitt sindur undarligt at skifta ímillum málini. Nú hava vit sungið á føroyskum, donskum og enskum, og tá eg eri blivin vanur við at syngja á einum máli, so skifta vit. Men nú dugi eg ikki fleiri mál, so vit kunnu ikki skifta til nakað nýtt, sigur Hans Edward Andreasen skemtandi.

### Judas-agtigt

The Dreams skiftu frá føroyskum – og lutvíst enskum – til danskt, tá teir royndu at vinna fram í Danmark, og tað riggaði heilt væl, tí The Dreams telist millum tey populerastu nøvnini millum danskan ungdóm.

Nú eru The Dreams farnir aftur at syngja á enskum máli, tí teir ætla sær at røkka longur út í heim, og fyrsti sangurin er komin út . Tað er sangurin Under The Sun, sum hesa vikuna hevur ligið ovast á Boogie-listanum í Danmark.

– Vit hava fyri tað mesta fingið positivar reaktiónir, nú hava vit skift til enskt. Onkur negativ viðmerking hevur eisini, men tað hevur ikki verið so ringt, sum tá vit skiftu frá føroyskum til danskt, sigur Hans Edward Andreasen.

– Tá vit fóru at syngja á donskum, vistu vit, at tað fóru at koma nakrar reaktiónir, tí tað var kanska eitt sindur judas-agtigt at gera tað, sigur Hans Edward.

The Dreams kann upplivast á palli í Føroyum hetta vikuskiftið. Teir spæla til tiltakið Crazy Night á Kambsdali leygarkvøldið.

## INNIHALD

4 SAMRØÐA: **KIKKI DANIELSSON Í ERLIGARI SAMRØÐU**
6 MÓTI: **BARNSLIGT Í FØROYSKUM INTERNETHANDLUM**
7 90 SEKUND: **SONJA JÓGVANSDÓTTIR SVARAR**
8 SAMRØÐA: **AGNAR ARTÚVERTIN GEVUR NÝTT STUTTSØGUSAVN ÚT**
11 10 TING UM: **JON STEWART**
12 UMMÆLI: **AFTAN Á UNDRIÐ**
14 TIL ARBEIÐIS: **JONNA HANSEN APOTEKARI**
15 UMAFTURAFTURUMAFTUR: **HØGNI DJURHUUS**
16 REPORTASJA: **OASIS OF THE SEAS FER AV BAKKASTOKKI**
18 SPYRST SO LIVST: **RIGMOR SVARAR**
19 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **THAI-INSPIRERAÐ GRINDAWOK**
23 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR OSFR.**
24 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**

# Vambakonur við **stíli**

**KLUMMA**
**Anna V. Ellingsgaard**
anna@sosialurin.fo

Havi eina vinkonu, sum ikki fekk farið á lívsstílstevnu herfyri, tí hon stóð beint í øllum slaktinum. Tað gera konur í Føroyum jú í heystfrítíðini, tí tá fara menn í Føroyum á fjall.

Hvørt ár.

Men gakk, tað høvdu lívsstílskonurnar uppi á Hotell Føroyum gloymt, sjálvt um teirra spísskompetanca vist er at halda eyga við, hvat er uppi í tíðini.

Sovorðnar konur hava eisini forbiðið nógv um oyruni, og tá er skjótt, at okkurt líkasum 'smuttar'. Nokkso keðiligt hjá vambakonunum, tí í lýsingini stóð, at konurnar á hotellinum fóru at hava tað »ordliga hyggens« við smiley-tekni og øllum.

Tað kann eisini hugsast, at vambakonur ikki ordiliga telja við, tá lívsstílskonurnar snakka um, hvat er 'hot' og hvat er 'not' í føroyska kvinnu-universinum. Ella flakakonur - hinar í Klaksvík, tit minnast, sum fyri nøkrum árum síðani ikki sluppu við til Havnar at taka lógvatak saman við øllum hinum konunum í Norðurlandahúsinum at lyfta okkum allar inn í eina meir frígjørda framtíð. Tær høvdu ikki tíð, tí tær – ná ja, stóðu og skóru flak, tí tað gera flakakonur mánadag, men tað hevði onkur kona í Havn gloymt.

Tí hoyrdu flakakonurnar heldur ikki allar teir fínu fyrilestrarnar um, hvussu tær skulu networka tvørtur um flakamaskinurnar og vera assertivar so tær kundu lyfta seg upp á ein betri skammil at standa á ájavnt tann hjá monnunum.

Og hesuferð mugu vambakonurnar bara droyma um, hvussu tær kunnu kombinera kunstigar negl við at binda windsor-slipsa-knútin hjá manninum, tá hann kemur aftur av fjalli, heitur og tystur eftir einum lekrum smoothie.

Virkeliga spell, also.

Tað hildu konurnar á hotellinum eisini, sum ikki skiltu petti av, at tað ikki komu fleiri føroyskar konur á lívstílsstevnu. Nei, ikki er tað lætt at raka rætta stílin – serliga ikki, tá man skal sikta uttan um bóndakonur, flakakonur, sjómannakonur og hálvtíðar vambakonur, sum standa og skugga fyri allastaðni.

Men hvør veit – kanska fara lívsstílskonurnar at geva vambakonunum eitt ordans makeover næstu ferð, vaska luktin av teimum og bjóða teimum til sofaprát um, tvørligar rukkulakkar ella hvørjir seymir skapa tey mest stílfullu blóðpylsuindrini?

Tað hevði verið ordliga hyggens.



**MYND:** SAVNSMYND

VIKUSKIFTI
**Redaktørar:** Inna Törnroos og Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Jensen
**Forsíðumynd:** Agnar Artúvertin / Símun J. Hansen